# Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Lot til andøvsgul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig. Um kvøldið veksur hann vindin av landsynningi.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og avfall, partvís kavi. Um kvøldið minni vindur av landnyrðingi. Hitin millum 0 og 3 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum 0 og ÷3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi og vátaslettings- ella kavaælingur. Hitalagið millum ÷1 og +3 stig.




# Kular Røtur lova stórsligið undirhald

*Tað er lagt upp óført undirhald, tá Kular Røtur, barnastjørnur, Trølla-Pætur og búktalari fara á pallin á Kambsdali leygardagin við tónleiki, myndashowi og øðrum undirhaldi*

Leygardagin fara Kular Røtur at hava stórfingna konsert í ítróttarhøllini á Kambsdali.

Talan verður um tiltak, sum neyvan er roynt áður í Føroyum. Alt undirhaldið er føroyskt, og tað er serliga ætlað børnum.

Kular Røtur, sum hava givið eina fløgu út, og sum á konsertini hjá Creamy vístu, at tey eisini duga á palli, fara at spæla sangir sum *Bilurin hjá okkum, Vera hon er vell* og *Grønir menn frá Pluto*.

Eisini verður onkur nýggjur sangur, sum kemur út á næstu fløguni hjá Kulum Rótum, at hoyra.

Stórskíggi verður settur upp á pallinum, og har verður stórt myndashow at síggja. Talan er um tekningar, sum Jógvan á Høvdanum hevur gjørt til sangir hjá Kulum Rótum.

Eisini verða dansigentur við, og sum nakað nýtt kemur tann øðiligi Trølla-Pætur á vitjan í høllini

**Barnastjørnur**
Á konsetini fara børn, sum hava serlig tónleikalig evni, at framføra onkrar sangir.

Brandur fer at syngja ein sang, Rebekka og Kristian Blak fara at spæla á fíól og klaver og Dánjal fer saman við beiggja sínum at syngja tveir sangir, annar er heimagjørdur.

Búktalarin Absalon fer at hava Fjarðarok og Nikláa á pallin við sær, og tað fer helst okkurt stuttligt at spyrjast burtur úr.

Kular Røtur, sum júst hava fingið nýggja heimasíðu, lova stórfingið undirhald í morgin, og vit hava frætt, at tað hevur verið vant dúgliga til konsertina leygardagin.

Konsertin byrjar klokkan 17.00.




Hátrýstryggurin yvir Íslandi fer í landsynning um Føroyar fríggjadagin.




Lágtrýstið yvir Íslandi fer suðureftir skamt vestanfyri Føroyar og gevur vind og avfall leygardagin.




**Hitalagið mált frá 12./04. kl 06[00]–13./04. kl 06[00]. Hitin í gjár: 1,2°C**
Minsti hiti máldur í apríl: **÷9,9°** Mesti hiti máldur í apríl: **15,0°**




Avfallið: 0,1 mm – **mált frá 12./04. kl 6[00]–13./04. kl 06[00]**
Avfallið higartil í apríl: 41,2 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | ÷2 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 4 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannahavn | 7 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 19 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 22 |
| New York | 8 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

## Vestfalskyrrindi

8. apríl: Mánin næstur jørðini
11. apríl: Fyrra kvarter
18. apríl: Fullmáni

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. apr. | 4:02 | 16:34 | 3:02 | 15:34 | 3:17 | 15:49 | 6:02 | 18:34 | 7:02 | 19:34 | 2:17 | 14:49 | 1:17 | 13:49 | 4:17 | 16:49 | 5:17 | 17:49 | 3:47 | 16:19 | 5:02 | 17:34 |
| 15. apr. | 5:04 | 17:29 | 4:04 | 16:29 | 4:19 | 16:44 | 7:04 | 19:29 | 8:04 | 20:29 | 3:19 | 15:44 | 2:19 | 14:44 | 5:19 | 17:44 | 6:19 | 18:44 | 4:49 | 17:14 | 6:04 | 18:29 |
| 16. apr. | 5:53 | 18:13 | 4:53 | 17:13 | 5:08 | 17:28 | 7:53 | 20:13 | 8:53 | 21:13 | 4:08 | 16:28 | 3:08 | 15:28 | 6:08 | 18:28 | 7:08 | 19:28 | 5:38 | 17:58 | 6:53 | 19:13 |
| 17. apr. | 6:32 | 18:51 | 5:32 | 17:51 | 5:47 | 18:06 | 8:32 | 20:51 | 9:32 | 21:51 | 4:47 | 17:06 | 3:47 | 16:06 | 6:47 | 19:06 | 7:47 | 20:06 | 6:17 | 18:36 | 7:32 | 19:51 |

Kelda: Skipalistin 2000